




## Mugu hugsa seg væl um

*Vit hava spurt landsstýris-mannin í fiski-vinnumálum, Jacob Vester-gaard, hvussu hann sær støðuna, nú ikki er óhugsandi, at fiskiflotin verður lagdur*

**Hvørjar vónir hevur tú um, at reiðarar og manningarfeløg fara at semjast?**
- Tað er trupult at meta um, men tað letur til, at trupult verður at koma undir land við einum nýggjum sáttmála. Reiðarar tykjast vilja hava broytingar, men tað er sjálvsagt ógjørligt at siga, hvussu hart partarnir fara at koyra tað.

**Hvat fer eitt møguligt verkfall/ verkbann í fiskiflotanum at merkja?**
- Eitt møguligt verkfall ella verkbann er sera álvarsamt. Tað er sjálvandi ein álvarsom støða, tá verkfall er í eini so stórari høvuðsvinnu, sum okkara fiskivinna er, og tí er at vóna, at partarnir – so ella so – finna fram til semju.

**Hevur tú nakra áheitan á partarnar í trætuni?**
- Eg vóni bara, at báðir partar – reiðarar og manningarfeløg – skilja álvaran í støðuni og hugsa seg væl um, áðrenn fiskiskipaflotin við verkfalli ella verkbanni verður lagdur. Partarnir noyðast at loysa trupulleikarnar í felag, og vit kunnu bara vóna, at funnið verður fram til semju, soleiðis at fiskiskipaflotin ikki verður lagdur, sigur landsstýrismaðurin.

# Eingin oljufepur í Grønlandi

**Vissa. Grønland verður ikki eitt arktiskt Kuwait. Tað vissar grønlendski landsstýrisformaðurin um, eftir at hava verið á almennari vitjan í Noregi**



*Grønlendski landsstýrisformaðurin Kubik Kleist*

Jan Müller

Norska umsitingin av oljuni er ein fyrimynd fyri Grønland. Hetta sigur grønlendski landsstýrisformaðurin Kubik Kleist við norska blaðið Stavanger Aftenblad undir eini almennari vitjan hjá grønlendskum politikarum og vinnulívsfólki í Noregi.

Amerikanskar metingar vilja vera við, at Grønland goymir eins stórar nøgdir av olju og gassi sum tær, ið higartil eru funnar á norska landgrunninum. Kortini hevur grønlendski landsstýrisformaðurin bæði bein á jørðini og minnir á, at grønlendingar sláa kalt vatn í blóðið, tá tað snýr seg um framtíðar oljuvinnu. Grønlendingar hava ongan skund og eru tolnir.

Kubik Kleist sigur við norska blaðið, at oljufeprin er mest at finna í donskum fjølmiðlum. –Vit grønlendingar hava lært at vera tolnir, og higartil veit eingin, um tey fund, sum eru gjørd, eru lønandi. Men tað finst eitt ávíst bjartskygni leggur hann aftrat og vísir á, at grønlendska oljuævintýrið er fyribils einans eitt ævintýr, men verður olja funnin er tað sjálvandi ein stór avbjóðing. Hann sigur, at Grønland hevur nógv at brúka oljupengar til. Umleið helvtin av fíggjarlógini í Grønlandi kemur úr Danmark. Haraftrat er stórur tørvur á at byggja út skúlaverkið, heilsuverkið og undirstøðukervið. Einans 40% av grønlendingum hava í dag eina útbúgving sigur Kleist, sum eisini heldur, at grønlendska samfelagið tørvar fleiri bein at standa á. Í dag er fiskivinnuna høvuðsvinnan.

- Fyri okkum í Grønland er Norra á nógvum økjum ein fyrimynd, bæði tá tað snýr seg um krøv til trygd og til umsiting av oljupengunum, og fara vit at stovna ein oljugrunn, um nógv er til av olju.

Kubik Kleist sigur við blaðið, at tað er lítil vandi fyri, at Grønland endar sum eitt nýtt Kuwait. Tað verða ikki nøkur fá, sum koma at eiga ríkidømið, sum skal umsitast til felags besta vissar hann um.

Grønlendski landsstýrisformaðurin hevur saman við oljumálaráðharra sínum og embætisfólki vitjað í Oslo og Stavanger. Tey hittu Jens Stoltenberg forsætisráðharra og Jonas Gahr Støre uttanríkisráðharra og vórðu eisini til audiens hjá Harald kongi. Í Stavanger varð vitjað hjá Statoil, har eitt nú føroyski stjórin í Statoil, Rúni M. Hansen var vertur.

*jan@sosialurin.fo*

## Í MORGIN

**2/5 °C**



5-10 m/s 10-15 m/s

Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og ælingur, partvís vátakavi, men seinnapartin minkar hann vindin av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

## MIKUDAGIN

**6/9 °C**



11-16 m/s 6-11 m/s

Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt, men támut veður og hitin millum 6 og 9 stig.

## HÓSDAGIN

**5/8 °C**



9-14 m/s 9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og eitt skifti regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, leygardagin hækkar hann upp í útnyrðing. Fríggjamorgunin okkurt ælið, annars turt og sólglottar. Hitint millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 983 hPa. við Ísland fer í landnyrðing.




**Komandii nátt:**
Lágtrýstið við Svalbard stendur mestsum í stað. Ein veikur hátrýstryggur vestan fyri Ísland verður yvir Føroyum týskvøldið.

## HITALAG




## AVFALL



Miðal: 133 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -- | **Tromsø** | -2 | **Moskva** | -7 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 4 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 1 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 3 | **Oslo** | -1 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 14 |
| **Lerwick** | 1 | **Stokkhólm** | -5 | **Madrid** | 10 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 2 | **Keypmannah.** | 1 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 3 | **Helsinki** | -10 | **Malorca** | 12 | **New York** | 10 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

10. jan. Mánin longst frá jørðini
12. jan. Fyrra kvarter
19. jan. Fullmáni
22. jan. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 17. jan. | 04:13 | 16:39 | 03:13 | 15:39 | 03:28 | 15:54 | 06:13 | 18:39 | 07:13 | 19:39 | 02:28 | 14:54 | 01:28 | 13:54 | 04:28 | 16:54 | 05:28 | 17:54 | 03:58 | 16:24 | 05:13 | 17:39 |
| 18. jan. | 05:05 | 17:31 | 04:05 | 16:31 | 04:20 | 16:46 | 07:05 | 19:31 | 08:05 | 20:31 | 03:20 | 15:46 | 02:20 | 14:46 | 05:20 | 17:46 | 06:20 | 18:46 | 04:50 | 17:16 | 06:05 | 18:31 |
| 19. jan. | 05:58 | 18:20 | 04:58 | 17:20 | 05:13 | 17:35 | 07:58 | 20:20 | 08:58 | 21:20 | 04:13 | 16:35 | 03:13 | 15:35 | 06:13 | 18:35 | 07:13 | 19:35 | 05:43 | 18:05 | 06:58 | 19:20 |
| 20. jan. | 06:43 | 19:08 | 05:43 | 18:08 | 05:58 | 18:23 | 08:43 | 21:08 | 09:43 | 22:08 | 04:58 | 17:23 | 03:58 | 16:23 | 06:58 | 19:23 | 07:58 | 20:23 | 06:28 | 18:53 | 07:43 | 20:08 |
| 21. jan. | 07:33 | 19:56 | 06:33 | 18:56 | 06:48 | 19:11 | 09:33 | 21:56 | 10:33 | 22:56 | 05:48 | 18:11 | 04:48 | 17:11 | 07:48 | 20:11 | 08:48 | 21:11 | 07:18 | 19:41 | 08:33 | 20:56 |